H.C. Andersen hald:

# Sum í einum ævintýri

**Tað er ikki eiti á bókagávu, allir 6. floks næmingar í í danska ríkinum hava fingið í sambandi við føðingardagin hjá stóra ævintýrskaldinum H.C. Andersen. Fríggjamorgunun fingu føroyskir næmingar hvør sítt eintak av bókini, sum er eitt savn av 29 av kendastu ævintýrunum saman við 150 heilt nýggjar tekningum**




*Næmingarnir í 6. Flokki í Fuglafjarðar Skúla gleddu seg at sleppa at kaga nærri í stóru H.C. Andersen ævintýrbókina*

BÓKAGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fríggjamorgunin fingu allir 6. floksnæmingar í Føroyum hvør sítt eintak av eini nýggjari útgávu av útvaldum H.C Andersen ævintýrum. Í hesum sambandi var stórt hátíðarhald í Norðurlandhúsinum, har fleiri hundrað næmingar vóru savnaðir. Eftir at Jenny Lydersen, leiðari á fólkaskúladeildini, hevði greitt frá um H.C Andersen og hansara lív, las Súsanna Tórgarð ævintýrið um Svínadrongin, áðrenn spennandi bókagávan varð handað

### H.C. Andersen í Føroyum ...

Tað var Jørn Grønkjær Jensen, stigtakari til bókagávuna, sum handaði landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvani á Lakjuni fyrsta eintakið. Jørn G. Jensen hevur arbeitt við hesi ætlanini seinastu tvey árini og var sera ovfarin av stóra hátíðarhaldinum í Føroyum.

- Hetta er avgørt største hátíðarhaldið, sum hevur verið hildið í sambandi við bókagávuna, og fyri meg er tað heilt ótrúligt at síggja, hvussu nógv verður gjørt burtúrúr her í Føroyum. At føroysku fyrireikarnir hava valt hava tiltakið í Norðurlandhúsinum og saman við Altjóða Frásøgudegnum ger hetta eisini til nakað heilt serligt. Hetta er jú sum í einum ævintýri, segði ein bergtikin Jens G. Jensen.

Jørn G. Jensen hevur vitjað fleiri ferðir í Føroyum og helt fyri, at tað var spell at H. C. Andersen ongantíð legði leiðina til Føroyar, tá hann ferðaðist.

- Ímynda tær, hvat hann hevði fingið burturúr øllum trølla- og huldusøgunum og kvæðunum og tí ótrúligu føroysku náttúrini, helt Jens fyri, men var kortini sannførdur um, at eisini føroysk børn lættliga kunnu liva seg inn í ævintýrheimin hjá H.C.Andersen, ikki minst saman við nýggju tekningunum hjá Flemming B. Jeppesen

### 80.000 eintøk

Umframt donsku og føroysku næmingarnar, fáa eisini íslendskir og grønlendskir 6. floks næmingar hvør sítt eintak av ævintýrbókini. Í alt 80.000 eintøk eru prentað til gávus, men tað ber eisini til at keypa bókina í bókabúðunum. Bókagávutiltakið hevur kostað uml 2,6 mill og er fíggjað av danska undirvísingarmálaráðnum, HCA grunninum, Norhaven Book og Gyldendal. Í sambandi við handanina av bókini í Føroyum nýtti Jens G. Jensen eisini høvið at takka Atlantic Airways fyri stóra vælvild og peningaligan stuðul til flutningin av nógvu bókunum til Føroyar.

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur latið nýggju ævintýrbókina týða til føroyskt í sambandi við H.C.Andersen árið, og varð føroyska útgávan eisini løgd fram á hátíðarhaldinum fríggjamorgunin.



*Jens Grønkjær Jensen, stigtakari til stóru H.C.Andersen bókagávuna, handaði Jógvani á Lakjuni fyrsta eintakið av bókini í Føroyum*



*Súsanna Tórgarð las ævintýrið "Svínadrongurin"*

# H.C. Andersen á føroyskum

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út stórt savn við 29 ævintýrum eftir H. C. Andersen. Flemming B. Jeppesen hevur myndprýtt bókina.**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Nógv verður gjørt í ár at hátíðarhalda, at 2. apríl eru 2000 liðin, síðan heimsgitni danski rithøvundurin, Hans Christian Andersen, varð føddur. Um allan heim eru nógv tiltøk, og í heimlandinum, Danmark, verður m.a stórt tiltak í "Parken", sum teir siga, á sjálvum føðingardegnum við upplestri, sjónleiki og tónleiki.

Men grundarlagið undir øllum er skrivaða orðið, og nú ber til at ogna sær framúr vakra bók við nøkrum av bestu ævintýrum H.C. Andersens á føroyskum. Ævintýrini eru 29 í tali, og tað er Marius Johannessen, sáli, ið hevur týtt flestu teirra, 19. Av hes-um hava 10 ikki áður verið á prenti í týðing Mariusar. Trý onnur, ið eisini eru farin, hava týtt hvør sítt: Christian Lützen, Maria Mikkelsen og Hans Marius Eidesgaard. Sigrun Hjalmarsdóttur hevur eisini týtt eitt, og afturat eru so 6 ævintýr, ið ikki áður vóru á føroyskum; tey hevur Amy Tausen týtt.

Ævintýrini í bókini eru: Klokkan (MJ), Lítla havfrúgvin (MJ), Blómurnar hjá Idu lítlu (AT), Granntræið (MJ), Snjódrotningin (MJ), Snurr-an og bólturin (SH), Seyðagentan og skorsteinssóparin (AT), Tað, sum maður mín ger, er altíð best (MJ), Álvheyggjur (AT), Hin áhaldni tinsoldáturin (HME), Tað er rættuliga vist! (CL), Flúgvandi kuffertið (MJ), Villu svanarnir (MJ), Hon nyttaði onki (MJ), Søgan um eina mammu (MM), Reyðu skógvarnir(MJ), Vætturin hjá viðskerakeypmanninum (AT), Kavamaðurin (AT), Smágentan við svávulpinnunum (MJ), Náttargalin (MJ), Eldførið (MJ), Nýggi búni keisarans (MJ), Mishátti dunnungin(MJ), Dólg-Hanus (MJ), Lítli Klávus og stóri Klávus (MJ), Prinsessan á ertrini (MJ), Pinkulisa (MJ), Svínadrongurin(MJ) og Galosjurnar hjá Eydnuni (AT).




*Niels Jákup Thomsen á Bókadeild Føroya Lærarafelags legði føroysku útgávuna av ævintýrbókini fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*